# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# AMERIKANSKUR SUPERBILUR

Við 1183 hk og eini toppferð upp á 412 km/t er amerikanski superbilurin Shelby Aero TT heimsins næst máttmiklasti superbilur eftir Bugatti Veyron 16,4 Super Sport, sum nú er komin í Guinness Book of Rekords við 1200 hk eini toppferð upp á 431,072 km/t.

Shelby Aero TT kom í Guinness Book of Rekords í 2007 sum heimsins máttmiklasti superbilur.



Shelby Aero TT er ein superbilur við eini toppferð uppá 412 km/t



Shelby Aero TT hevur 6,4 litra V8 motor við 1183 hk




Shelby Aero TT

# FTZ á Hotel Føroyum

Danska heilsølufyritøkan innan eykalutir og amboð til bilar, FTZ Autodele & Værktøj, skipaði fyri kunnandi fundi á Hotel Føroyum hóskvøldið 28. oktober. Fyritøkan hevur etablerað seg í Føroyum sum FTZ-Amboð & Billutir og heldur til í Havn og á Kamsdali.

Á fundinum vóru fólk úr meginpartinum av landinum, sum umboðaðu ein stóran part av føroysku bilbransjuni. Tað vóru umboð fyri FTZ saman við varastjóranum, Michael Juul Hansen, sum kunnaði um hvørjir møguleikar eru við nýggju eykalutaskipanunum.

FTZ Autodele & Værktøj A/S er størsta heilsølufyritøkan í Danmark innan eykalutir og amboð til bilar. Fyritøkan hevur 47 deildir við 840 starvsfólkum.




Varastjóranum hjá FTZ í Danmark, Michael Juul Hansen


## Hósdagin 4. november kl. 17.15

Í sendingini Vinnu- & Bilradio verður vitjað á fyritøkuni Kelvin á Hjalla, sum hevur spesialiserað seg í loysnum innan køling og hitaendurvinning. Fyritøkan arbeiðir eisini við aircondition anleggum í øllum støddum, eisini til bilar. Í hesum sambandi er samrøður við Kristian Martin Skála og Petur Egholm frá Kelvin. Eisini er samrøða við Michael Juul Hansen frá FTZ.

Í vinnuinnslagnum er samrøða við Charlotte Ellendersen, sum eigur og rekur fyritøkurnar Daddan og Smyrjibreyðsbúðina í Havn.



Charlotte Ellendersen frá Dadduni og Smyrjibreyðsbúðini



Petur Egholm frá Kelvin



Kristian Martin Skála frá Kelvin

Vinnu- & bilradio á Rás 2